# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*Amerikanska framferðin hevur skyldina av atsóknini*

*(Iran um bumbuálopið á pílagrímarnar).*



*Bussarnir við pílagrímunum fóru í smildur*

*Myndir: Reuters*

# Bumba í Irak drap 13 iranar

**13 iranskir pílagrímar doyðu í einari sjuálvmorðsatsókn í morgun. Iran gevur amerikanarunum skyldina**

BUMBUATSÓKN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bumbumaðurin hevði bumbuna í bili sínum, og uttan fyri eina mosku í býnum Najaf læt hann bumbuna bresta millum tveir bussar við iranskum pílagrímum. Irakska løgreglan kunngjørdi seinni, at 13 pílagrímar høvdu latið lív av bumbuni, og at 41 aðrir vóru særdir.

Síðani stýrið hjá Saddam Hussein fall, hava nógvir shiamuslimskir pílagrímar úr Iran vitjað moskuna í Najaf, sum er ein tann týdningarmesti halgistaðurin hjá shiamuslimunum.

Amerikanska herleiðslan í Irak ávaraði í gjár um, at tann nýggi leiðarin hjá al-Qaeda í Irak, Abu Ayub al-Masri, tykist hava lagt seg eftir at brúka bilbumbur ímóti iraksku myndugleikunum og fremmandu herdeildunum.

Samstundis bendir alt á, at al-Qaeda nú leggur seg eftir at søkja at tí shiittiska meirilutanum. Eitt nú doyðu meiri enn 60 fólk, tá ein bilbumba brast í shiittiska partinum av Bagdad seinasta leygardag, og í gjár kravdi ein onnur bilbumba fimm mannalív.

Men iransku myndugleikarnir heva amerikanarunum skyldina av atsóknini at pílagrímunum í morgun. Ein talsmaður hjá uttanríkisráðnum í Teheran segði, at tað er teirri miseydnaðu framferðini hjá hersetingarvaldinum fyri at takka, at ágangurin í Irak heldur fram. Hann heitti samstundis á iraksku stjórnina um at verja teir iransku pílagrímarnar, sum koma hagar.

# Rakettirnar hjá Norðurkorea taka oljuprísin við sær

**Tær norðurkoreansku rakettroyndirnar hava elvt til stúran, og tað ávirkar oljuprísin**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var tann tíð, tá George W. Bush, forseti, umrøddi Irak, Iran og Norðurkorea sum tey óndu londini, og hesaferð er tað tað seinasta, sum voldi amerikanarunum og øðrum høvuðbrýggj – eisini á oljumarknaðinum.

Herfyri sendi ósemjan um iranska kjarnorkuvápnaætlanina oljuprísin upp ígjøgnum, og í gjár hendi tað sama, tá Norðurkorea gjørdi av at royna sjey rakettir, hóast USA og grannalondini høvdu ávarað landið ímóti vat gera tað.

Á oljumarknaðinum í New York hækkaði oljuprísurin í gjárkvøldið, so amerikonsk olja, sum skal latast í august, kom upp í 75,19 dollarar fyri tunnuna. Sambært Bloomberg hevur prísurin ikki verið so høgur, síðani handilin við slíkum oljusáttmálum byrjaði fyri 23 árum síðani.

Norðsjóvaroljan kvinkaði eisini uppeftir, og í morgun var prísurin oman fyri 74 dollarar. Seinni fall hann eitt vet og kom niður á 73,7 dollarar.

Seinnapartin skuldi amerikanska orkumálaráðið almannakunngera, hvussu stórar landsins olju- og bensingoymslur eru, og tað plagar at ávirka prísin. Frammanundan varð roknað við, at bensingoymslurnar eru í minna lagi.

## STUTT SAGT

### Krevur kanning

Forsætisráðharrin í Irak, Nouri al-Maliki, vil hava óheft fólk at kanna ein tilburð, tá ein amerikanskur hermaður neyðtók og drap eina irakska gentu og fleiri av skyldfólkum hennara.

Amerikanski herurin hevur longu tikið hermannin og sett hann í varðhald, eftir at hansara felagar hava viðgingið, at hermaðurin neyðtók og drap gentuna og trý onnur fólk, teirra millum eitt trý ára gamalt barn. Hermaðurin skal fyri rættin í USA, men nógv bendir á, at fýra av feløgum hansara enda eisini í rættinum í sambandi við tilburðin.

– Vit fara at krevja eina óhefta kanning av tilburðinum. Kann tað ikki lata seg gera, fara vit at krevja, at vit og amerikanararnir gera kanningina í felag. Vit kunnu ikki góðtaka brotsverk ímóti irakum, segði Nouri al-Maliki, forsætisráðharri, tá hann í gjár var á vitjan í Kuwait.

### Ymsar áskoðanir um yvirgang

Í morgin er eitt ár liðið, síðani yvirgangsatsóknir at undirgrundarbreytini og einum bussi í London kravdu 52 mannanlív, og í tí sambandi hevur blaðið The Times spurt bretskar muslimar, hvat teir halda um yvirgang og yvirgangsmenn.

Sjey prosent siga, at tað er í lagi at fremja sjálvmorðsatsóknir ímóti sivilfólki í Bretlandi. 16 prosent siga, at tey vóru ímóti atsóknini, men at málið hjá yvirgangsmonnunum var í lagi. 18 prosent svara, at tey høvdu einki sagt, um onkur av teirra næstu fór upp í al-Qaeda, meðan 35 prosent siga, at tey høvdu verið glað, um onkur av teirra skyldfólkum fór upp í bretsku løgregluna.

Tariq Ghaffur, sum er tann ovasti muslimski løgmaðurin í Bretlandi, sigur við The Times, at kanningin hjá blaðnum vísir, at Bretland hevur framvegis ein lítlan muslimskan minniluta, sum er ein veruligur vandi í samfelagnum.

### Verður settur til viks

Tann sosialistiski forsætisráðharrin í Slovakia, Robert Fico, og flokkur hansara eru ikki serliga væl umtóktir í ES, tí teir hava skipað stjórn saman við einum víðgongdum høgraflokki.

Millum teirra, sum ikki vilja sita til borðs saman við slovakisku sosialistunum, er fyrrverandi danski forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen, sum er formaður í sosialdemokratiska tingbólkinum í ES-tinginum. Hann hevur skotið upp, at tey sosialistisku umboðini úr Slovakia verða hildin uttan fyri tingarbeiðið, so leingi flokkur teirra situr í stjórnarsamgongu saman við tí høgravenda flokkinum. Nyrup er ikki einsamallur, tí teir svensku sosialdemokratarnir siga tað sama.

Sjálvur roynir Robert Fico at verja flokkin við at siga, at tað er álagt flokkunum í stjórnini at verja minnilutar í landinum og at stríðast ímóti rasismu. Hetta er beinleiðis vent ímóti tí høgravenda SNS-flokkinum, sum fleiri ferðir hevur niðrað tann ungarska minnilutan og sigoynararnar í Slovakia.